## Bretar til Noregs

Ongantíð hava so nógv bretsk ferðafólk vitjað í Noregi sum nú, og norska ferðavinnan ætlar at fremja fleiri átøk fyri at fáa uppaftur fleiri bretar at vitja. Hagtølini vísa, at 250.000 bretsk ferðafólk vóru í Noregi í fjør, og tað var 19 prosent fleiri enn í 2005. Bretsku ferðafólkini hava serliga áhuga fyri ferðunum hjá Hurtigruten fram við landi, og leiðslan har ætlar sær at skipa fyri fleiri sølufremjandi tiltøkum fyri at fáa uppaftur fleiri bretar til Noregs.

## Fekk brugdu í garni

Einar Pedersen fekk ein hvøkk, tá hann fríggjadagin var í ferð við at draga nøkur toskagørn, sum hann hevði standandi í Tysefjørðinum í Norðurnoregi. Brádliga varnaðist hann, at eitt ella annað stórt var í einum garni, og tað vísti seg at vera ein hálvan fjórða metur langur hávur. Seinni bleiv staðfest, at talan var um eina brugdu. Fiskifrøðingarnir siga við Nordlys, at hetta brugduslagið kann blíva heilar 12 metrar til longdar.



# Føroysk skip í kanadiskum valstríði

**Kanadiarar nokta framvegis føroyskum skipum at koma í havn. Valár er í Kanada, og politikararnir tora ikki at slaka, tí teir óttast fiskimennirnar á eysturstrondini**

VITJAN
*Kári Mikkelsen*
*kari@sosialurin.fo*



*Hóast hon skilir føroysku sjónarmiðini, so kundi kanadiski sendiharrin í Danmark, Frederica Gregory, ikki lova løgmanni, at forboðið móti føroyskum skipum í kanadiskum havnum verður avtikið í bræði*

*Mynd: Løgmannskrivstovan*

Onki ítøkiligt kom burtur úr kanadisku sendiharravitjanini í síðstu viku. Eitt av høvuðsmálunum, sum Jóannes Eidesgaard, løgmaður, tók upp á fundi við Frederica Gregory, sum er kanadiskur sendiharri í Danmark, var málið um kanadisku havnirnar, ið eru stongdar fyri føroyskum fiskiskipum.

Kanadiarar eru ónøgdir við, at føroyngar i sokallaða NAFO-økinum hava tikið sær rætt til at fiska fleiri rækjur, enn NAFO hevur ásett. Ein meirfiskiskapur, sum føroyska fiskivinnan sambært løgmanni hevur søgulig rættindi til. Hetta er fallið í ringa jørð hjá serliga kanadisku fiskimonnunum á eysturstrondini, ið eru sera ónøgdir við føroysku meirfiskiskapin. Og av tí at val skal vera í Kanada – antin longu í vár ella í heyst – so tora kanadisku politikararnir als ikki at nerta við havnaforboðið móti føroyskum fiskiskipunum. Til tað standa ov nógvar atkvøður millum fiskimennirnar upp á spæl.

Talan er um trý føroysk rækjuskip, sum havar roynt á hesi leiðini. Tey eru Artic Viking, Havborg og Fríðborg. Talan er um stórar og góðar rækjur, ið fáast á NAFO-leiðini, sum er altjóða sjógvur.

Havnaforboðið er ein trupulleiki hjá føroysku skipunum, tí tey til dømis ikki hava møguleika fyri at koma inn at bunkra, men mugu sigla alla leiðina til Íslands ella Føroyar at gera hetta.

### Onga heimild við sær

Sambært Jóannesi Eidesgaard var tað týðuligt, at kanadiski sendiharrin onga heimild hevði fingið við sær at slaka í hesum spurninginum um havnaforboðið, og tí kom hon heldur ikki við nøkrum lyfti.

Sjálvt um onki ítøkiligt kom burtur úr vitjanini, so heldur løgmaður kortini, at tað hevði verið tað vert at taka ímóti kanadiska sendiharranum, ið vísir Føroyum stóran áhuga og hevur sett seg væl inn í føroysk viðurskifti.

Onnur evni, ið løgmaður og sendiharrin tosaðu um á felags fundinum, vóru millum annað einskiljing, altjóðaagerð og møguleikar fyri øktum samstarvi millum Føroyar og Kanada.

Eftir fundin við løgmann hitti Fredericka Gregory Bjarna Djurholm, landsstýrismann við vinnumálum og Bjørn Kalsø, landsstýrismann við fiskivinnumálum. Harafturat vitjaði hon á Fróðskaparsetrinum, Norðurlandahúsinum, Altjóða skrivstovuni fyri útbúgvingar, Listaskálan, Ríkisumboðið og 8. flokk á Venjingarskúlanum.

Hetta var aðru ferð, at kanadiski sendiharrin í Danmark vitjaði í Føroyum. Fyrstu ferð var fyri tveimum árum síðani.

Frederica Gregory fór avstað aftur fríggjadagin.

# Vinningsbýti av virðisbrævahandli

**Sjálvt um sjálvur raktsturin gav eitt minni undirskot var samlaða úrslitið hjá Virðisbrævamarkaði Føroya so mikið gott, at aðalfundurin hevur gjørt av at rinda 1,8 mió. krónur í vinningsbýti**

AVLOP
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Strategiska samstarvið hjá Virðisbrævamarknaði Føroya, VMF, við Kauphøll Íslands hevur givið úrslit. Í tíðindaskrivi skrivar Landsbandi Føroya, at góða rakstrarúrslitið hjá VMF er eitt úrslit av hesum samstarvinum.

Sum partur í samstarvinum keypti VMF í 2004 4,4 prosent av Eignarhaldsfelagnum. Verðbréfaþingi hf., sum átti Kauphøllina, frá íslendska fíggjarmálaráðnum fyri 1,3 mió kr. Svenska partafelagið OMX, sum rekur virðisbrævamarknaðirnar í Svøríki, Danmark, Finlandi og baltisku londunum, keypti 30. november 2006 Eignarhaldsfélagið Verðbréfaþing hf., ið lutvíst varð gjørt við umbýti av partabrøvum og lutvíst við peningaútgjaldi. VMF fekk meira enn 10 mió. krónur í vinningi av handlinum og eigur partabrøv í OMX, sum við árslok 2006 høvdu eitt virði upp á 9,5 mió. krónur.

Partafelagið Virðisbrævamarknaður Føroya hevði aðalfund 26. februar 2007, har roknskapurin 2006 og býti av yvirskoti vórðu góðkend.

Meðan hallið av vanliga rakstrinum í 2006 var upp á 0,4 mió. krónur, hevði felagið eitt avlop eftir skatt upp á 8,7 mió. krónur. Avlopið av fíggjarpostum var 10,4 mió. krónur, og felagið kemur at rinda 1,3 mió. krónur í virðisbrævaskatti.

Felagið samtykti á aðalfundinum at rinda 1,8 mió. krónur í vinningsbýti til partaeigararnar, ið svarar til 20 prosent av partapeninginum.

Partaeigarnir eru býttir í fýra bólkar: Útgevarar, íleggjarar, meklarar og myndugleikar. Størstu partaeigararnir eru Fíggjarmálaráðið, sum eigur 44 prosent og Landsbanki Føroya við 30 prosentum. Hinir partaeigararnir, sum standa í roknskapinum, eiga 25 prosent av partapeninginum.

Tveir nevndarlimir stóðu fyri vali. Teir eru Stefán Halldórsson og Tummas Eliasen, sum báðir vórðu afturvaldir í nevndina fyri tey komandi trý árini.



*Samlaða avlopið hjá Virðisbrævamarknaði Føroya, VMF, var so mikið frægt, at felagið á aðalfundi í síðstu viku gjørdi av at rinda 1,8 mió. krónur í vinningsbýti. Høvuðseigarar eru Fíggjarmálaráðið og Landsbankin við ávikavist 44 og 30 prosentum*